# Heilsanir

## Tøkk

Vit vilja fegin takka øllum sum á ymiskan hátt gjørdu diamantbrúdleypsdag okkara tann 18. nov. 2010 so góðan og minnisríkan.
Ein serstøk tøkk til børn, svigarbørn, ommu- og abbabørn við makum, langommu- og langabbabørnum fyri teirra stóru hjálp og vælvild.
Somuleiðis ynskja vit tykkum øllum eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

**Irena og Kristian Olsen, Porkeri**



**Góði Jan**
Hjartaliga tillukku við tí runda degnum tann 3. februar. Høvdu vilja verið heima og hátíðarhildið dagin saman við tær.
**Heilsan vit á Amager**



**Góði gubbi**
Hjartaliga tillukku við 30 ára føðingardegnum. Takk fyri at tú ert so góður við meg.
**Heilsan Tobias**



"Kenni ein piparsvein..." - Tillukku við piparinum :)
Gita hvør



**Góða elskaða Sanna**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum 1. febr. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja omma og abbi**



**Góða fitta Sanna**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 1. febr. Vit elska teg.
**Kærastu heilsanir**
**Katrina, Karsten og Dan Eyðun**



**Góði Sólbjartur**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum 3. febr. Nú er tú ein stórur drongur.
**Muss og klemm frá ommu og abba**



**Til okkara elskaða skatt Sólbjartur**
Stórt tillukku til okkara STÓRA drong sum verður 6 ár 3. febr., og um ikki so langa tíð eisini Stóribeiggi :) Mamma og babba elska teg yvir alt í verðuni, og vóna at tú fær ein super góðan føðingardag:)
**Muss og klemm frá mammu og babba**


Sosialurin Heilsanir kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Mik. ☐ Frí.

Tekstur:

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn:
Bústaður:
Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<


# Tiltøk

**Aftankvirra í Havnar kirkju**
fríggjakvøldið kl. 21-23.
Kl. 22 spælir Ragnar Olsen guitar. Kl. 22.30 andakt.

**Filadelfia Tórshavn**
Mikudagin kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum kl. 18 Delli, børn frá 3. til 6. flokk.
Fríggjakvøldið kl. 20 Mammur hittast til bøn.
Leygardagin kl. 9.30 Undirvísing við Leif Petterson - tilmelding - sí á filadelfia.fo
Kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, Leif Petterson talar kl.13.15 Sundagskool.

**Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími v/ Hera Joensen. Evni: Jes 2
Sunnudagin kl. 11 Sunnudagskúli í kirkjutíð. Kl. 18 møti v/ Jógvan Reynslág, Argir

**Samkoman Marknagil Fjalsg. 2, Tórshavn**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími
Sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagin kl. 12 Sunnudagsskúli.
Kl. 18 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og lærumøti. Einar Vang talar.
Hósdagin kl. 15.45 Gentukórið Kassia venur. Kl. 20 Ungdómsmøti. Høgni Johannesen tosa um evnið "Vilji Guds."
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Rodmundur í Liða talar. Barnaansing í Lítla Sali. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti. Barnaansing í Barnarúminum.
www.ebenezer.fo

**Fríkirkjan Oasan**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 After8.
Leygarkvøldið kl. 20 syngið við kvøld.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/ Jóhan P. Johannesen. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Verið hjartaliga vælkomin.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/Torsten Jortzick, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná messuna verður ein drekkamunn. eingin sunnudagsskúli verður í dag. Tað er tilbiðjan av Heilaga Sakramentinum í Kerit frá kl. 17 til 18. Øll eru vælkomin.
www.katolsk.fo

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Mikukvøldið kl. 20 Møti. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum. Verið hjartaliga vælkomin.

Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, møti fyri børn frá 8 ára aldur. Vit møtast heima hjá Karin, Fjalsgøta 29 A. Havi 20 kr við !. Børnini verða øll koyrd heim eftir møtið. Verið hjartaliga vælkomin. Onki ungdómsmøti verður vegna ungdómslegu í Dali hetta vikuskifti.
Sunnudagin kl. 11.30 Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/ sunnudagsskúla. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum. Verið vælkomin.

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Hósdagin kl. 16 gentukóri venur.
Kl. 20 Ungdómsmøti v/ Sverri Steinhólm, Skapanin og syndafallið.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti: v/ Ásbjørn Jacobsen, Antikrist og endatíðin. Øll eru vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mikukvøldið kl. 18 Vit koma saman. Sunnudagin kl. 11 Familju og morgunmøtið, UV-night kl. 19.

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Mikukvøldið kl. 20 møti

**Hebron á Argjum**
Mikudagin kl. 10 Bønarløta fyri kvinnur. Kl. 20 Húsbólkar og tí einki møti í Hebron.
Fríggjadagin kl. 10: Bønarløta fyri kvinnur og menn.
Sunnudagin Onki møti og eingin sunnudagsskúli. Samkoman í Hebron er á legu á Zarepta.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagur kl. 19 í KFUM: Ten-sing venur. Hetta er fyri ungdómin.
Hósdagur kl. 20 í KFUK: Varðmenn hittast.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Nólsoy**
Sunnudagin kl. 17 verður møti v/ Per og Sólrun Poulsen. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 19.30 bønarløta.
Hósdagin kl. 17 barnaarbeiðið.

**Missiónshúsið á Sandi**
Mikukvøldið kl. 20 er sang- og bønarløta. Øll vælkomin
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og møti kl. 18.

**Aglow Sandoy**
Hey allar kvinnur/gentur. Vit byrja aftur mánadagin kl. 19 í Samljóð Skopun. Systir Marisa og Inge Lise Lolike leiðari av alheimsbønardegnum í Danmark skal tosa um týdningin av bønini. Møti fjølmentar